# Tveir finalistar eru funnir



*Fuglfirðingar eru í finaluni*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**FLOGBÓLTUR** Besta kvinnuliðið hjá SÍ og besta mansliðið hjá ÍF hava tryggjað sær pláss í steypafinaluni

Uni Holm Johannesen

SÍ vann 3-2 á Drátti hóskvøldið. Við sigrinum vunnu kvinnurnar úr Sørvági seg í finaluna. SÍ er fremst í bestu kvinnudeildini aftaná fyrsta triðingin av landskappingin. Tað gevur teimum sætið í steypafinaluni.

Mansliðið hjá ÍF vann greitt 3-0 á Mjølni á Kambsdali seinnapartin. Fuglfirðingar eru fremst, tvey stig framman fyri SÍ, nú fyrsti triðingurin er avgreiddur.

Steypafinalurnar verða avgreiddar í februar.

*uni@sosialurin.fo*

# SÍ greiddi sína skyldu

**MANSFLOGBÓLTUR** TB setti sær sum mál at vinna eitt sett í hesum kappingarárinum. Tað málið er rokkið. Í gjár góvu teir SÍ góða mótstøðu, men sørvingar greiddu sína skyldu og vunnu 3-0

Uni Holm Johannesen

Tað tóktist sum, at menninir úr Sørvági vistu, at teir spældi móti einum liði, sum neyvan fór at geva teimum mótstøðu.

SÍ royndi tískil nýggj álopsmynstur og gav fleiri spælarunum møguleikan, sum ikki hava spælt so nógv í hesum kappingarárinum.

Úrslitið var munurin á settúrslitunum ikki var so stórur, sum væntað frammanundan.

SÍ vann 3-0, og settúrslitini vóru 25-18, 25-18 og 25-20.

Menninir úr Sørvági fingu stigini og varðveita tískil annað plássið í Eik-liguni. SÍ er tvey stig aftan fyri oddaliðið í løtuni.

*uni@sosialurin.fo*

# Mjølnir tók ikki av

**MANSFLOGBÓLTUR** Mjølnir hevði tvær ferðir upplagdan møguleika at vinna sett í dystinum móti oddaliðnum, men klaksvíkingar tóku ikki av. Tí er Mjølnir nú seks stig frá oddasessinum

Uni Holm Johannesen

Fyrsta settið og seinasta settið vann ÍF við úrslitinum 29-27. Mjølnir fylgdi fuglfirðingunum til málstrikuna, men misti so fótafestið og snávaði í seinastu løtu. Klaksvíkingar mistu tískil eitt fet í oddastríðnum. ÍF hevur við sigrinum lagt seks stig millum seg og Mjølnir, sum er nummar trý.

*uni@sosialurin.fo*



*Mynd: Álvur Haraldsen*

# TB bjóðar oddinum av

**KVINNUFLOGBÓLTUR** Við sannførandi sigrinum á Kambsdali hevur TB vunnið seg nærri oddinum. Kvinnurnar av Tvøroyri bjóðað nú av

Uni Holm Johannesen

TB fekk tvey sera týdningarmikil stig í skjáttuna leygardagin.

Kvinnurnar av Tvøroyri løgdu ikki serliga væl frá landi. Úrtøka var soltin fyrstu dystirnar, men nú hevur liðið vunnið sær pláss í stríðnum um finalupláss.

TB er bara tvey stig aftan fyri Mjølnir, sum er fremst.

Liðið basti ÍF á útivølli um vikuskiftið. Úrslitið var 3-1. Settúrslitini vóru 25-21, 18-25, 24-26 og 10-25.

Kvinnurnar úr Fuglafirði tóku tískil ikki av upplagda møguleikanum at leggja seg undir liðuna á oddaliðnum.

*uni@sosialurin.fo*

## EIK-LIGAN, KVINNUR:

**ÍF – TB 1-3**
(25-21, 18-25, 24-26 og 10-25)

## EIK-LIGAN, MENN:

**ÍF – Mjølnir 3-0**
(29-27, 25-20 og 29-27)

**SÍ – TB 3-0**
(25-18, 25-18, 25-20)

## Eik-ligan *kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | SÍ | 7 | 6 | 1 | 18 | 9 | 9 | 12 |
| 2 | Mjølnir | 7 | 5 | 2 | 18 | 7 | 11 | 10 |
| 3 | Fleyr | 7 | 5 | 2 | 17 | 10 | 7 | 10 |
| 4 | ÍF | 7 | 4 | 3 | 13 | 11 | 2 | 8 |
| 5 | TB | 7 | 4 | 3 | 15 | 14 | 1 | 8 |
| 6 | KÍF | 7 | 2 | 5 | 8 | 18 | -10 | 4 |
| 7 | Dráttur | 7 | 1 | 6 | 11 | 19 | -8 | 2 |
| 8 | Ternan | 7 | 1 | 6 | 7 | 19 | -12 | 2 |

## Eik-ligan *menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 8 | 7 | 1 | 21 | 5 | 16 | 14 |
| 2 | SÍ | 8 | 6 | 2 | 20 | 7 | 13 | 12 |
| 3 | Mjølnir | 8 | 4 | 4 | 13 | 13 | 0 | 8 |
| 4 | Fleyr | 8 | 3 | 5 | 11 | 17 | -6 | 6 |
| 5 | TB | 8 | 0 | 8 | 1 | 24 | -23 | 0 |